# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Melur um heita greytin

Tað er valla nakar, sum hevur roknað við kollveltdandi útmeldingum frá Landsfundi Sambandsfloksins um vikuskiftið. Hinvegin hava altjóða fíggjarkreppan og samgongustevið fylt so nógv í politiska gerandisdegnum, at ein kundi væntað nakrar tungar politiskar útmeldingar frá flokkinum, ið hevur fyrisætið í samgonguni.

Vanligt er, at flokkar á landsfundi seta út í kortið ta kós, ið skal verða hildin og taka fram stór og prinsipiell mál. Vanliga verður við hesum tikið støði í samgonguskjalinum. Hvørji eru so tey mál, sum Sambandsflokkurin lyftir fram í síni landsfundaryvirlýsing? Fyrst verður tikið dyggiliga undir við tí politikki, sum samgongan hevur fest niður í samgonguskjalið. Við hesum kann staðfestast, at Sambandsflokkurin sum heild ikki tekur undir við ávísum tingmonnum floksins, sum meira ella minni opinlýst hava roynt at seta kílar í samonguna. Sostatt kann landsfundurin tulkast sum eini boð frá flokkinum til innanfloksandstøðuna um at rætta inn og geva samgonguni arbeiðsfrið.

Samtyktin er áhugaverd ikki so nógv orsakað av teimum politisku málum, sum eru raðfest og sum skulu røkkast í hesum valskeiði, men minst líka so nógv orsakað av teimum evnum, ið ikki eru nevnd ella gjøllari umrødd í samtyktini. Líta vit fyrst at teimum málum, ið verða tikin fram, so má ásannast, at flokkurin í fyrstu atløgu hevur fingið gongd á fyrsta part av sínum Europapolitikki. Í samgonguskjalinum er ásett, at ein serfrøðingabólkur skal greina allar møguleikar fyri tilknýti til ES og møguleikan fyri EFTA-limaskapi. Við støði í frágreiðingini verður viðgjørt politiskt, hvussu víðari verður farið fram. So vítt so gott, nú verður spennandi at síggja, hvørja lagnu henda serfrøðingafrágreiðing fer at fáa, tá hon einaferð kemur í ljós. Sambandsflokkurin hevur lovað ein heilt nýggjan Europapolitikk. Hesin politikkur kemur ikki burturúr nakrari serfrøðingafrágreiðing eina, tí hesin poltikkur fortreytar nakrar harðar og sera torførar politiskar avgerðir, sum eingin flokkur ella samgonga higartil hava megnað at taka. Tíðin fer at vísa, hvørt leiðsluførleiki og politiskur ryggur er í samgonguni til at taka hesar avgerðir og seta tær í verk.

Tað eru onnur merkisverd viðurskifti við landsfundarsamtyktini. Hóast samtyktin tekur fram týðandi mál sum játtanarskipan, fíggjarlóg, kommunulóg, eftirlønarskipan, gransking, umhvørvi, fiskitilfeingi, so er her talan um mál, ið hinir báðir samgonguflokkarnir umsita. Her er lítið og einki um tey stóru og tungu mál, sum Sambandsflokkurin varar av í landsstýrinum. Her er einki um almannamál og einki um vinnumál, ið eru meira enn aktuel í hesum døgum. Her er heldur einki, sum minnir um eina samlaða kreppustrategi, nakað, sum má vera ábyrgd løgmans. Her melur flokkurin um heita greytin. Hetta kann alt vera av tilvild, men hetta kann eisini vera tilvitað. Hetta er í øllum førum eitt sindur løgið.

**Sosialurin**

# Hvør skal hava avgerðarrættin á aðalfundinum hjá Atlanntic Airways?

JAN HALDANSEN



**- Landið sum eigur 67% ella minnilutapartaeigaranir, har eingin er omanfyri 6% í ognarskapi? Atlantic Airways er framvegis alment og ogn okkara – skattgjaldarin eigur enn 67%**

Tað eru fólk kring landið, sum tíverri sita tigandi til tann glantrileik og tað maktspæl, sum fyrigongur í løtuni, nú landsstýrismaðurin Jóhan Dahl vil hava nevndarbýti í Atlantic skal avspegla seg eftir ognarstøddini í felagnum.

Fólkaflokkurin goyr og tosar gjøgnumskygni, um álit, um teir privatu sum fáa alt at bera til, og at landið skal halda seg langt burtur - ja eg má siga, hann forbarmi seg, so hevur man eisini hoyrt tað við.

Tað er ikki annað enn rimiligt, at landið sum eigur 67% eisini hevur tilsvarandi umboðan og avgerðarmynduleika, - tað haldi eg landið skal hava, og tað kann ikki verða rætt at nakrir smáir partaeigar, sum tilsamans umboða umleið 13-15% av felagnum skulu seta seg á felagið og stýra tí.

Tað vildi verið púra vitleyst at gingið við til hetta, og eg ivist heldur ikki í, at um landsstýrismaðurin lat tað fara um seg, eftir tað sum hendi við rossahandlinum millum leiðslu, nevnd og onglendingin Noskwith, so vildi hann verið harðliga kritiseraður fyri ikki at røkja sínar skyldur og ábyrgd sum landsstýrismaður.

Tað er ótrúliga langt út at pástanda, at landið skal hava brotið lyftir, tí man vil velja ein lim afturat í nevndina, eftir at fyrrv. landsstýriskvinna »lat« privatu eigaranar á seinasta aðalfundi fáa eitt umboð í nevndina, men samstundis »gloymdi« at økja nevndina til 4 aðalfundarvaldar, tí hon átti at vitað, at hon broytti javnvágina við at lata hendan eina til teir privatu partaeigararnar.

Ein skal ikki gloyma, at tað sita tvey føst vald starvsfólkaumboð í nevndini, so í veruleikanum so vildi eitt óheppið útfall við avgerðandi atkvøðum í nevndini um ósemja verið tann, at landið sum er 67% eigari kann sita við undirlutan við einans 40% umboðan í nevndini við bert at hava tveir limir.

Tað kann heldur ikki verða nakar trupulleiki at skilja, at hetta eigur at rættast skjótast gjørligt.

**At ein onglendingur, sum hevur sæð sær fyrimun og møguleika at fáa fatur á okkara tjóðarflogfelag, við at handla við felagið, halda seg væl við leiðsluna og enntá bjóða leiðsluni at keypa teirra partabrøv, fyri síðani at bjóða somu leiðslu at hesin handil partvís skal/kann fremjast við partabrævabýti í sínum felag, sum jú handlar nógv við Atlantic, hetta kann ikki sigast at verða annað enn reinur »bananrepublikks«- handilsháttur.**

Álvaratos - her kann ikki annað enn handlast, og hvønn møguleika hevur landið so, - jú landið sum størsti partaeigari skal bert gera sína ávirkan galdandi á aðalfundinum, og tað ger landið við at velja eina skikkaða, dugnaliga nevnd og tryggja sær meirilutan í nevndini.

Sjálvandi skal landið hava avgerðarrættin við sínum 67%.

Longur er tann søgan ikki.

Restin av søguni og ruðuleikanum sum er íkomin, er íspunnin av Fólkaflokkinum, hetta er ikki at taka feil av, tí hetta er teirra vanligi skitni taktikkur. Eg hugsi, at Fólkaflokkurin roynir at verja fólkaflokksstuðlarnar í nevnd og ánaraskaranum hjá Atlantic Airways.

§§ 266b, 157a 81

# Seksuel orientering

BILL JUSTINUSSEN
løgtingsmaður



Fyri góðum tveimum árum síðani var stór politisk ósemja um uppskot Tjóðveldisins um broytingar í § 266b í revsilógini, har orðini "seksuel orientering" gjørdust partur av greinini. Miðflokkurin var harðliga ímóti at seta hesa orðing inn í lógina, tí vit halda tað ikki vera rætt, at homoseksuel verða mett sum ein minnilutabólkur, sum skal hava serliga verju ájavnt vit etniskar og religiøsar minnilutar. Alt samfelagið var á gosi vegna hesi tvey orðini.

Nú ger landsstýriskvinna Fólkafloksins Annika Olsen sama nummarið umaftur. Nú vil hon hava hesi bæði orðini, sum eru ein uppfinning hjá valdmiklu homo-aktivistunum, inn í aðrar lógargreinar í revsilógini. Hon hevur lagt uppskot fyri Løgtingið, har hon bæði í § 81 og í § 157a vil hava orðini "seksuel orientering" at standa. Sostatt hevur hon dyggiliga prógvað, at víðgitna glíðibreytin ikki bara var tómt tos, men framskygd hugsan. Og tá tey homoseksuellu nú í enn størri mun verða góðtikin sum ein minnilutabólkur, sum tørvar serliga verju ájavnt við minnilutabólkar vegna trúgv, húðalit og uppruna, er vegurin enn betri slóðaður til aðrar lógir so sum lóg um skrásett parlag og rætt hjá homoseksuellum at ættleiða.

Annika Olsen er enntá so nasadjørv, at hon víðkar heimildirnar í § 266 b við einum ískoytisstykki, har tað nú eisini skal bera til at revsa fólk, sum kunnu sigast at tosa niðursetandi um homoseksuel sum liður í propagandavirksemi. Tað er nú næstan bara upp til hugflogið at finna orsøkir fyri at stevna fólki fyri rættin, sum ditta sær at siga sína hugsan um homoseksuellan livihátt. Tí er vandi á ferð í Føroyum. Her eru mong, sum hava sterkar meiningar um slík viðurskifti, og teirra meiningarfrælsi verður nú enn meiri skert.

Tillukku til samgonguna fyri tykkara ússaliga og óføroyska politikk. Og takk til Jógvan á Lakjuni, at tú stendur sum drangur í brimi.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.